# Eingin vindur tá myllurnar "skuldu" mala

**Tær tríggjar vindmyllurnar, sum SEV hevur sett upp í Neshaga, eru nú alment tiknar í nýtslu og geva streym til netið hjá elfelagnum**

VINDMYLLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vindmyllurnar, sum elfelagið SEV hevur sett upp í Neshaga, eru nú "alment" farnar at mala. Men tær mólu ikki, tá ið tær "skuldu" mala seinasta fríggjamorgun, tá ið Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV, við eina hátíðarløtu alment skuldi seta tær í gongd. Tað var eingin vindur hendan frálíka morgun, og óneyðugt er at siga, at vindur er treytin fyri, at myllurnar kunnu mala og geva streym inn á netið hjá SEV.

Væntandi er tó ikki, at vindurin í Føroyum fer sín veg med alla.

Gamla vindmyllan, sum SEV fyri umleið 12 árum síðan keypti frá Nordtank og setti upp í Neshaga, hevur malið væl hesi árini og hevur – hóast hon er nógv minni enn nýggju myllurnar – givið væl av streymi inn á netið hjá SEV.

Hóast verkætlanin við gomlu mylluni var lutfalsliga stór í mun til orkuna, hon gevur, hevur Nordtank-myllan nú malið so leingi og givið so nógvan streym, at íløgan er um at verða vunnin innaftur í spardum oljuútreiðslum.

### Hátíðarløta

Seinasta fríggjamorgun skipaði SEV fyri hátíðarløtu í Neshaga, har myllurnar standa.

Umframt umboð fyri SEV, SEV-stýrið og landsstýrið, vóru eisini arbeiðstakarar við, sum hava bygt vegin út ígjøgnum Neshaga, hava lagt kaðlarnar og hava stoypt fundamentið undir myllurnar.

Tað er danska fyritøkan, Vestas, sum hevur selt SEV hesar tríggjar myllurnar, og felagið átók sær eisini at bera kostnaðin av allari uppseting.

Eftir hátíðarløtuna, har eitt nú landsstýrismaðurin í orkumálum, Bjarni Djurholm, hevði sagt nøkur generell orð um orku, Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV hevði takkað arbeiðstakarum og Leivur Hansen, formaður í SEV-stýrinum, alment hevði sett myllurnar í gongd, var skipað fyri borðhaldi í matstovuni, Casablanca í Saltangará, har eini 60 fólk sótu til borðs.

Við hesum eru nú tær tríggjar nýggju vindmyllurnar hjá SEV í Neshaga alment tiknar í nýtslu – og kunnu mala streym inn á netið hjá SEV, sum samstundis sparir dýrar litrar av tungolju á verkinum á Sundi.





*Vit meta, at nýggju vindmyllurnar í Neshaga spara SEV fyri eini 1500 tons av olju um árið, sum svara til umleið 2,7 miljónir krónur, sigur*

Vindmyllurn

# Ein skilagóð íløga við

**SEV sparir umleið 2,7 miljónir krónur í olju um árið, nú tær tríggjar vindmyllurnar í Neshaga eru farnar at mala**

VINDMYLLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Oljuprísurin er so høgur í løtuni, at hann tyngir um allastaðni í samfelagnum. Hetta geldir bæði húsahald, skiparakstur og virkini, sum brúka nógva olju.

Samstundis, sum oljuprísirnir eru høgir, tekur elfelagið SEV tríggjar nýggjar vindmyllur í nýtslu í Neshaga.

Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV, sum hevur verið projektleiðari í verkætlanini við vindmyllunum, sigur, at eitt tons av tungolju, sum verkið á Sundi brennur, kostaði einar 1200-1300 krónur seinasta ár. Seinasta oljan, sum SEV fekk til verkið herfyri, kostaði hinvegin meira enn 1800 krónur tonsið.

- So, her er talan um ein stóran prísvøkstur, sigur Henning.

### Góð íløga

Verkfrøðingurin vísir á, at samlaða íløgan í verkætlanina í Neshaga er einar 17 miljónir krónur.

- Vit meta, at vindmyllurnar spara SEV fyri eini 1500 tons av olju um árið, sum svara til umleið 2,7 miljónir krónur.

Henning sigur, at ein íløga upp á 17 miljónir krónur, sum í løtuni sparir SEV fyri slakar 3 miljónir krónur um árið, er skilagóð.

- Nakað fer avstað aftur í rentum og møguligum viðlíkahaldi, men við dagsins prísum sparir íløgan í Neshaga seg í øllum førum aftur eftir minni enn 10 árum, og tá má hetta sigast at vera ein góð íløga.

Hann sigur, at Nordtank-vindmyllan, sum SEV